

Mynd: Helge Hansen/Statoil

# Orkustjóri: Skundið tykkum at tøma oljubrunnarnar

**Jógvan Hugo Gardar**

13.11.2015 - 13:57

Oljan.fo

Stjórin á orkudeildini hjá amerikanska bankanum Citi, Seth kleinman, heldur at Noreg eigur at læra av Saudi-Arabia. Hann heldur at í staðin fyri at bíða við at pumpa upp oljuna í norskum sjógvi, so eigur heldur at verða roynt at fáa hana upp sum skjótast.

Kleinmann sigur í samrøðu við Dagens Næringsliv, at Noreg eigur at hugsa sum Saudi-Arabia.

- Um heimsins lond semjast um at málið um at hitin á jørð ikki skal økja við tveimum stigum, so kemur eftirspurningurin eftir olju at koma í hæddina í 2015, og síðani kemur áhugin fyri oljuni sum orkukeldu at minka skjótt. Hetta eigur at vera ein veking fyri lond sum Noreg, Saudi-Arabia og Russland. Og Noreg eigur at gera sum hini bæði londini, nevniliga at stríðast fyri sínum parti av heimsmarknaðinum, og at seta í gongd nýggjar leitingar nú. Frá 2025 kemur tað ikki at loysa seg at leita eftir olju. Tí er neyðugt at hugsa at pumpast skal upp so nógv sum gjørligt, so skjótt sum gjørligt, sigur Kleinman

Erik Wærness, búskaparstjóri hjá Statoil, er ósamdur.

- tað er neyðugt at hugsa eitt sindur longur fram. Í tí myndini sum bði Statoil og altjóða orkugrunnurin hava av tvey-stig-malinum, so kemur heimurin at hava brúk fyri olju minst til 2040, og helst nakað væl longri. Saudi-Arabia og Russland klára ikki at yvirtaka allan

marknaðin. Í 2040 kemur heimurin at hava brúk fyri 80 milliónum føtum av olju hvønn einasta dag, sigur Wærnes í samrøðu við Dagens Næringsliv.